## Styðja deyðarevsing

Tveir triðingar av amerikanska fólkinum halda, at tað er rætt at hava deyðarevsing, og meiri enn annar hvør amerikanari heldur, at ov fá verða dømd til deyða. Í einari meiningakanning hjá Gallup siga 65 prosent, at tey eru fyri deyðarevsing, og 31 prosent halda, at uppaftur fleiri skuldu fingið deyðadóm. Tað eru serliga republikanskir veljarar, sum eru fyri deyðarevsing. 81 prosent av teimum republikonsku veljarunum styðja deyðarevsing, meðan 49 prosent av teimum demokratisku veljarunum hava somu hugsan. 40 deyðadømdir fangar eru tiknir av døgum í USA higartil í ár.



## Norðurkorea hóttir

Stjórnin í Norðurkorea vil vera við, at Suðurkorea hevur sent herskip inn í norðurkoreanskan sjógv vestan fyri Koreanesið. Tann almenna tíðindastovan í Norðurkorea endurgevur eina fráboðan frá herflotanum, sum sigur framferðina hjá grannalandinum vera øsandi, og at hon kann enda við samanbresti. Norðurkorea hevur ongantíð viðurkent sjómarkið millum londini, sum bleiv ásett aftan á vápnahvíldina í 1953. Bæði í 1999 og í 2002 vóru samanbrestir millum herskip úr teimum báðum londunum.

# Listin breiðir seg í Steinprent

**Øll listaáhugaði fáa nú høvi at kagar innar í Steinprent og síggja, hvat kann spyrjast burturúr, tá listafólk sleppa leys í einum dygdargóðum grafiskum verkstaði**




*Nýggja framsýningin gevur listaáhugaðum høvi at kaga innar og fáa innlit í arbeiðið, sum gongur fyri seg á Grafiska Verkstaði Føroya í løtuni*

LIST

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í morgin letur upp framsýningin »Steinverur« í Steinprent, har listaáhugað hava høvi at kaga innar og síggja, hvat gongur fyri seg á Grafiska Verkstaði Føroya í løtuni.

Framsýningin er dømi um teir serligu møguleikar, sum kombineraður verkstaður og framsýningarhøli hava fyri at geva áhugaðum innlit í arbeiðið á verkstaðnum beint nú. Framsýningin verður fjølbroytt við sera ymiskum listafólkum, ið tó hava meira til felags enn ein skuldi trúð, m.a. arbeiða øll listafólkini figurativt, eins og tey eru fødd eftir 1963.

### Sum tjóvur á nátt

Hetta er eisni árið, tá listamaðurin Marius Olsen varð føddur ,og tað verður áhugavert at síggja, hvat samanrenningin millum okkara besta grafikara og ein dygdargóðan grafiskan verkstað fer at føra við sær, sigur Kinna Poulsen, listaummælari, í skrivi frá Grafiska Verkstaðnum.

Sum dømi um úrslit av hesum samstarvi nevnir hon ta, eftir hennara tykki, framúrskarandi permumyndina, sum prýðir nýggjastu útgávuna av skaldskapartíðarritinum Vencil.

Kinna Poulsen greiðir frá, at myndevnisliga tekur Marius altíð støði í egnum lívi, sjálvt tá tað eyðsýniliga er eitt landslag, tað snýr seg um. Hyggur tú nágreiniliga at landslagsmyndini sæst til dømis endurskinið av eini vekjaraklokku, ella strikumynd av einum at síggja til heldur trilvandi kardiogrammi. Hetta eru alt myndevni, sum sipa til eina stokkuta tilveru, har deyðin hvørki er vælkomin ella óvæntaður gestur. Sostatt eru myndir Mariusar eksistentiellar, og tað sama er galdandi fyri allar myndirnar á framsýningini, at tær eru tilveruliga grundaðar.

### Skølturin í nýggjum høpi

Á framsýningini verður eisini høvi at síggja steinprent hjá Hanna Bjartalíð, sum hesa ferð hevur arbeitt myndevnisliga við nøkrum leikutoysbilum hjá soninum, ið er áhugavert og eyðkent myndevnisval fyri eyðmjúka listamannin, ið ikki sjáldan er raktur av listarligum og tilveruligum iva, skrivar Kinna Poulsen og leggur afturat.

- Við leikutoysbilunum skoða vit tilveruna úr barnahædd í einum tilvildarligum, men tryggum heimi, ið tó tykist spakuliga hóttur av eini byrjandi skipan og nógvu ferðini úti í verðini, sum vit síggja á bilstreyminum.

Hanni býr í Helsinki saman við Annu Seppäla (1974), sum vit eisini fara at uppliva á framsýningini.

- Tað munnu vera meir enn tíggju ár síðani, Anna sýndi fram síni verk í Føroyum, men hon hevur eitt nú úttikið á felagsframsýningum í Listaskálanum við sínum eitt sindur barnsliga og serstakliga originala myndamáli, skrivar Kinna Poulsen og vísir á eina av myndunum, Anna Seppäla hevur gjørt á Grafiska Verkstaðnum

- Á myndini sæst ein lítil skalli, sum gevur hugasamband við myndaheimin hjá Hanna, ið myndevnisliga aftur og aftur tekur til vakra skapið av mannaskøltinum. Anna sigur sjálv, at myndirnar hjá Hanna minna um okkurt, sum hon sjálv hevur gjørt og at tey bæði á henda hátt eru í einum støðugum listarligum dialogi.

Á eini aðrari mynd sæst eitt kantut stórbýarskap við sveimandi organiskum, ballónlíknandi formum. Tekningin er hugtakandi við dynamisku mótsøgnini millum tað kantut málrættaða og ein sveimandi opinleika har alt tykist gjørligt, heldur listaummælarin

### Óeinglaligar einglaverur

Bárður Oskarsson (1972) er at kalla javngamal við Onnu Seppäla, og hóast hansara myndamál kanska er eitt vet óhugnaligari enn hennara, eru tey ikki ólík í teirra dyrkan av einum einstøkum figuri, ið onkursvegna kemur at standa sum eitt slag av millumliði millum listafólk og áskoðara.

- Eftir øllum at døma er entreprenørurin hjá Bárði ein eingil, tí henda veran hevur bæði veingir og gloriu, sum rættir einglar jú eiga at hava. Allíkavæl er hetta upp á nógvar mátar ein sera óeinglalig einglavera, sum merkiliga óhetjuliga og passiv situr hendur í favn, sigur Kinna Poulsen, og leggur afturat.

- Vit kenna aftur stílin frá málningum hjá Bárði og frá hansara vælumtóktu barnabókum, men nýggju steinprentini eru serstakliga áhugaverd við einum búnari myndamáli, eins og myndirnar eisini innihaldsliga hava fingið eina nýggja tilveruliga tyngd.

Áhugaverdar eru eisini myndirnar hjá Illonu Raipala (1980), sum er undir útbúgving á finska kunstakademinum og sum hevur vitjað Steinprent í tríggjar mánaðar, her hon hevur verið í starvslæru. Nú hevur hon umframt prentingina eisini roynt seg sum listafólk við nøkrum myndum, ið sýnast hava eitt sera týðiligt kvinnuligt støði og sum snúgva seg um tann partin av tilveruni, ið snýr seg um parlagið millum mann og kvinnu. Feministiska perspektivið er serstakt í myndunum, sum harumframt eisini eru dekorativar, skrivar Kinna Poulsen.

Framsýningin Steinverur letur upp í morgin klokkan 16 og er opin dagliga í Steinprenti inntil 21. november.